## DAGSINS MEINING

# Samgongusirkus

Mong gjørdust kløkk, tá formaður Tjóðveldisfloksins og tvífalt landsstýrismaður í SvF kunngjørdi, at flokkur hansara fer at koma við uppskoti um at lækka prísirnar hjá SL fyri at fremja økismenning. Økismenning er økið hjá Elttør, og Strandferðslan økið hjá Djurholm.

Vit hava verið vitni til kríggj og balladu, síðani samgongan sá dagsins ljós. Og vit hava aftur og aftur fingið at vita frá oddamonnunum, at nú skuldi annað skinn takast um bak. Nú skuldu teir fara í arbeiðsklæðini osfr. Nú leggur formaður Tjóðveldisfloksins seg alment út í øki, ið tveir aðrir landsstýrismenn umsita. Og fólk spyrja: er hetta ein náttúrligur partur av demokratiinum, er hetta ein provokatión ella er hetta tann beri taktikkur!!!

Formaður Tjóðveldisfloksins er ov klókur til at fara út við slíkum av tilvild og óvart. Hetta er sjálvandi tilætlað. Kanska eitt takk fyri seinast. Ella er tað bara enn eitt tekin um, at Tjóðveldisflokkurin als ikki ynskir at halda fram í samgonguni, nú so stór myrk skýggj eru fyri framman. Vit hava hoyrt fólkafloksmenn gita, at Tjóðveldisflokkurin roynir at finna høvi til at sleppa úr samgonguni og helst verða tveittur út av Fólkaflokkinum. Hetta seinasta útspælið hjá Hoydal, provokatión um tú vil, kundi bent á tað. Kann tað vera ein »revsing« til Fólkaflokkin, tí hann enn ikki skrivliga hevur boðað reiðarríinum hjá Jógvan S frá avgerðini um at taka fiskiloyvið aftur?

Tey, sum fylgja við politiska glantrileikinum, nýtast ikki nakað serligt innlit fyri at gjøgnumskoða tað, ið hendir. Vit hava eitt landsstýri, sum er ósamt um so gott sum alt. Vit hava nakrar landsstýrismenn, sum als ikki kunnu sita í stovu saman. Vit hava ein løgmann, sum neyvan heldur nógv av varaløgmanni, og vit hava ein varaløgmann, sum ger alt fyri at provokera sama løgmann, sum so aftur finnur seg í næstan øllum. Nær er bikarið fult harra løgmaður.

Eingin kann taka frá Tjóðveldisflokkinum, at hann betri enn nakar annar flokkur megnar tað taktiska spælið í politikki. Hetta hava vit eisini sæð mong dømi um, eitt nú tá Anita á Fríðriksmørk setur alla dagskránna í miðlunum við at fara eftir skattalættanum til sjómenn – samtíðis sum hon veit, at hennara egni flokkur við fíggjarmálaráðharranum als ikki tekur undir við tí. So vit síggja hetta sama mynstrið. Tjóðveldisflokkurin provokerar ikki bert í landsstýrinum, hann provokerar eisini í løgtinginum. Sjálvandi skulu tingfólk bera fram tað tey hava uppá hjartað, men hvar er logikkurin og samgongustevið, tá tjóðveldispolitikarar taka sær umrøddu fríheitir uttan um sínar egnu samstarvspartarnar. Hetta líkist í veruleikunum tí taktikki, sum Óli Breckmann brúkti øll tey árini Fólkaflokkurin sat í samgongu við eitt nú Sambandsflokkin. So kanska eru flokkarnir ikki so ólíkir á hesum økinum heldur. Teir liggja, sum teir hava reitt. Hetta byggir í hvussu er ikki land.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Høgni Hoydal provikerar samgongusamarbeiðið

**Heðin Zachariasen**
*løgtingsmaður*



Eg bleiv ikki sørt kløkkur, tá eg sá og hoyrdi Høgna Hoydal úttala seg í Degi og Viku hóskvøldið um, at nú skal eitt samfersðlugjald til at fíggja Strandferðsluna og at hetta er ein liður í at menna útjaðarin. Um hetta skal fíggjast við eitt nú at hvør bilur skal gjalda meira í vegskatt og tað eru 20.000 bilar í Føroyum, so verður gjaldið hækkað 7.500 kr pr bil fyri at fíggja SL. Høgni Hoydal heldur, at tað er skeivt at tey sum brúka SL gjalda eitt brúkaragjald, sum er umleið helvtin, meðan hin helvtin verður goldin yvir skattin sum allir føroyingar gjalda ídag. Er tað skeivt, at tey sum brúka SL gjalda fyri tænastuna, so er tað heilt skeivt, at tey sum als ikki brúka SL skulu gjalda.

So kunnu vit spyrja, hví tað er Høgni Hoydal, sum nú kemur inn á økið hjá Bjarna Djurholm, sum er landsstýrismaður í samferðslumálum og Eyðun Elttør sum er landsstýrismaður í útoyggjamálum. Hevur Høgni Hoydal so lítið at gera? Tað átti hann ikki, nú hann hevur tveir landsstýrissessir at umsita í forvegin. Mátin hjá Høgna Hoydal er eftir mínum tykki provikerandi og ein niðurgerðing av Bjarna Djurholm og Eyðun Eltør. Tað eru jú teir sum eru landsstýrismenn á nevndu økjum.

Høgni Hoydal kundi heldur fortalt Føroya fólki, hvussu hann ætlar at fíggja yvirtøkuna av eitt nú løgregluni, sum hann umsitir í landsstýrinum. Er hetta uppskotið ein máti at gera pláss á fíggjarlógini at fíggja tær 100 mill. kr., sum ein yvirtøla av løgregluni væntandi fer at kosta føroysku skattaborgarunum um árið.

# Útvarpið nýtir ósannindi móti fiskimonnum

**Óli Jacobsen**
*Formaður*
*í Føroya Fiskimannafelag*



Útvarpið hevur seinastu dagarnarført ein reguleran hets móti skattaskipanini hjá fiski- og sjómonnum. Hetta mál verður nærri lýst í komandi FF-blað, men í hesum umfari skal bert verða lýst tann beinleiðis villleiðing, sum útvarpið nýtir í hesum máli.

Grundarlagið fyri tíðindunum er orðaskiftið um løgmansrøðuna, har Annita á Fríðriksmørk mælti til at avtaka hesa skipan. Grundgevingin var m.a., at tann vandi, sum í 1998 skuldi vera fyri, at fiskimenn fluttu til Noregs vegna lagaligari skatting av fiskimonnum har, var í hvussu er ikki til staðar í dag.

Vit hava fingið staðfest, at tann tá lagaliga skattingin av fiskimonnum í Noregi er enn lagaligari í dag!

Síðan hevur útvarpið fingið roknað út, at umrødda skipan síðan 1998 hevur kostað 350 mill. »Typiskt« fyri útvarpið hava teir ikki roknað inntøkurnar við. Nevniliga teir skattaborgarar, vit hava fingið í fiskimonnum, sum eru búsettir aftur í Føroyum. Tað finst einki tal fyri hesum. Men rokna vit sum eitt dømi við 100 skattaborgarum, sum hvør rinda 150.000 kr. í skatti, so gevur hetta eftir 5,5 árum 82,5 mill. Hevði so verið roknað uppá, hvat hetta merkir fyri búskapin kundi skjótt fingist eitt heilt annað tal enn tað bílagda hjá útvarpinum.

Síðan verður Herman Oskarson førdur fram sum sannleiksvitni. Hann vísir til, at løgtingsmaður skal hava sagt undir sama orðaskifti, at síðan fiskimannaskattingin kom í gildi, hevur FF eingi krøv sett reiðarum. Og út frá hesum ger hann ta niðurstøðu, at tann »stuðul«, sum er ætlaður fiskimonnum harvið er kanaliseraður yvir til reiðarar.

Hertil er fyrst at siga, at tað ber als ikki til at sammeta sáttmálaviðurskifti hjá fiskimonnum við tey hjá t.d. arbeiðarum, sum mugu kempa seg til hvørja krónu omaná tímalønina. Fiskimenn fáa prosentpart av veiðuni, og hesin partur liggur vanliga fastur yvir eitt longri tíðarskeið. Inntøkurnar hjá fiskimonnum fylgja við inntøkunum hjá skipinum bæði upp og niður.

Hóast hetta er tað júst eydnast FF at fáa reiðarar av sínum parti av gjalda part av eftirlønarskipan hjá fiskimonnum. T.v.s. at samstundis við skattalættanum er prosentparturin hjá fiskimonnum við hesi skipan enntá øktur. Tískil er veruleikin tann beint mótsatti av tí, sum Herman rør uppundir.

Hetta merkir, at grundgevingarnar hjá Hermani, og tí løgtingsmanni, hann hevur sum keldu, eru bæði villleiðandi og beinleiðis ósannar.

Niðurstøðan er, at tíðindini hjá útvarpinum í hesum máli eru bygd á ósannindi og manipulatiónir. Hetta er annars bert ein váttan av teirri fatan, ein frammanundan hevur av almenna tíðindaflutninginum í Føroyum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Einskiljing av Føroya Banka skal rinda uttanlandsskuld og skerja blokk

**Kristina Háfoss**
*Løgtingskvinna*
*fyri Tjóðveldisflokkin*



Breið politisk semja er nú um, at tíðin er komin til, at seta punktum fyri kreppuloysnunum, ið gjørdar vórðu í 90'unum. Harvið er tíðin komin til, at lata landsins banka – Føroya Banka – aftur á privatar hendur. Treytin er tó, at føroyingar fáa sum mest fyri hesa almennu ognina – sum mest fyri tað stóra takið, ið allir føroyingar máttu taka í samband við fíggjarligu bjargingarnar av bankunum.

Rættuligt kjak hevur nú aftur tikið seg upp viðvíkjandi einskiljingini av Føroya Banka. Allir flokkar eru samdir um, at ein einskiljing skal fara fram á varligan og gjøgnumskygdan hátt, men uppskotini til, hvussu inntøkurnar frá hesi einskiljing skulu nýtast, hava verið mong.

Eisini Tjóðveldisflokkurin hevur sítt boð.

### Rætt at einskilja í góðum tíðum

Einstakir politikarar hava víst á, at tað ikki er rætt at einskilja í góðum tíðum – tí tá er avkastið jú gott. Til hetta er at siga, at tað sjálvsagt er júst í góðum tíðum, at føroyingar hava møguleika fyri at fáa sum mest fyri tey almennu virði, ið landið eigur. Ikki er rætt at einskilja tá illa stendur til. Tá fæst vanliga minni enn veruliga virðið er.

### Munandi minni avkast framyvir

Til spurningin viðvíkjandi stóra avkastinum úr Føroya Banka undanfarnu árini er at siga, at høvuðsorsøkin til hetta hevur verið, at ávísar avsetingar ímóti tapi í 90'unum hóast alt ikki gjørdust til tap – og tí eru hesar avsetingar inntøkuførdar seinastu árini. Hetta hevur givið bankanum avbera góð úrslit – og landinum gott avkast. Hesar inntøkuføringar av avsetingum eru nú um at verða av, og skal avkastið úr Føroya Banka til landskassan ikki væntast at gerast stórvegis komandi árini.

Stóru avsetingarnar vegna alivinnuna í ár gera, at helst onki avkast skal væntast komandi árið. Tí eigur hetta við avkastinum ikki at verða nøkur forðing fyri at lata bankan einskilja.

### Tað almenna ikki reka vinnufyritøkur

Aðrar orsøkir til at einskilja bankan eru, at fáa frígivið almenn virði og somuleiðis vil ein einskiljing tryggja greiðari ábyrgdarbýti og skilnað millum alment og privat virksemi. Sum víst hevur verið á so ofta áður, eigur tað almenna at nýta tíð og orku til vælferðartænastur og at skapa karmar – ikki til at reka vinnuligar fyritøkur.

Ikki tí – bankin verður í dag rikin sum ein fyritøka, óheft av politisku skipanini. Men sum kunnugt er tað Landsstýrið, ið – umvegis Fíggingargrunnin – eigur Føroya Banka. Tað er tí Landsstýrið, ið velur limirnar í nevndina hjá Fíggingargrunninum. Við núverandi ognarviðurskiftum kann tað tí ikki tryggjast, at politisk áhugamál ikki fara at snýkja seg inn í framtíðini.

### Útlendskir og føroyskir partaeigarar

Spurningurin viðvíkjandi føroyskum og útlendskum ognarparti hevur eisini verið vendur, og eru nógvir møguleikar hesum viðvíkjandi. Tó er greitt, at tað óivað hevði verið best fyri virksemi bankans at fingið ein størri »strategiskan partnara« úr útlondum. Síðan kundi restin av partabrøvunum verið seld yvir eitt áramál.

### »Bankin til fólkið«

Undir heitinum: »Bankin til fólkið« boðaði Javnaðarflokkurin herfyri frá, at ynskt varð, at einskiljingin av Føroya Banka m.a. skuldi innibera, at allir føroyingar fingu partabrøv ókeypis. Harvið varð bankin latin aftur til føroyingar. Hetta er ein góður tanki, men veruleikin er, at føroyingar sum heild fáa minni ágóða við partabrøvini verða býtt út – heldur enn at bjóða hesi partabrøv út og fáa sum mest fyri hesi.

### Ikki býta banka-partabrøv út

Orsøkirnar eru fleiri.

1) Fíggjarligu bjargingarnar av bankunum, og harvið ein stórur partur av uttanlandsskuld Føroya, varð í sínari tíð áløgd øllum føroyingum – uttan at hesir vórðu spurdir. Nú punktum skal setast er rætta mannagongdin ikki at nýta sama hátt, og áleggja øllum føroyingum at eiga ein part av bankanum – uttan at hesir verða spurdir.

2) At býta partabrøv út til føroyingar merkir bert, at tey, ið ætlaðu at keypa hesi, nú fáa tey ókeypis – meðan tey, ið ikki ynskja partabrøv kunnu selja tey. Vegna keyp og sølu vil tað yvir tíð óivað verða tey somu, ið eiga partabrøvini – uttan mun til um hesi upprunaliga verða býtt út ella seld.

3) Stórur partur av inntøkunum vil enda sum privat nýtsla, og landið missur við hesi loysn møguleikan, at nýta inntøkurnar frá einskiljingunum til felags besta nú og framyvir – eitt nú til rindan av uttanlandsskuld.

4) Virði á partabrøvum broytist yvir tíð. Verður neyðugt við meira kapitali til bankan, ella velur bankin at fáa nýggjan kapital og ognara inn – so verða tey partabrøv, ið eru latin føroyingum lutfalsliga minni verd. Vit vita frá øðrum bankum, at partabrøvini yvir tíð enntá kunnu enda við nærum als onki virði at hava.

### Partabrøv skapa virðisbrævamentan

Hinvegin hevur Javnaðarflokkurin víst á, at við at lata øllum føroyingum partabrøv vildi ein virðisbrævamentan verið grundað – og hetta kundi verið ein góð byrjan fyri ein føroyskan virðisbrævamarknað. Hetta er rætt og somuleiðis ein góður tanki – men neyvan ein nóg góð grundgeving fyri, ikki at tryggja, at føroyingar fáa sum mest fyri síni virði í Føroya Banka. Verður einskiljingin framd í verki, verða partabrøvini í Føroya Banka helst seld umvegis ein komandi føroyskan virðisbrævamarknað, og har fáa áhugaðir føroyingar møguleika at keypa og selja hesi í framtíðini.

### Ikki nýta inntøkur til vinnulívsstudning

Eisini formaðurin í tingbólki Fólkafloksins hevur verði frammi við uppskoti um, hvussu inntøkur frá eini einskiljing skulu nýtast. Hetta uppskotið varð, at nýta inntøkur frá einskiljing av Føroya Banka (ella uppsparing í Landsbankanum) til at seta í grunn, ið skal stuðla alivinnuni. Hetta má sigast at verða eitt undrunarvert uppskot, ið á ein hátt tekur pening úr bankanum at seta í grunn, fyri óbeinleiðis at lata henda pening aftur til bankan.

Hetta uppskotið er somuleiðis í stórari andsøgn við støðu Landsstýrisins, ið er, at beinleiðis stuðul ikki skal latast alivinnuni og vinnulívinum sum heild. Studningsleiðin varð roynd fyri stuttum – og endaðu føroyingar tá á blindvegi. Nú er at royna nýggjar leiðir.

### Rinda uttanlandsskuld og skerja blokk

Tjóðveldisflokkurin hevur hinvegin skotið upp eina heilt aðra loysn – nevnliga at nýta inntøkur frá eini einskiljing av Føroya Banka til at rinda uttanlandsskuld landskassans aftur, og at nýta spardu útreiðslurnar til rentur og avdráttir at skerja blokkin.

Nevnast kann, at í sambandi við viðgerðina av Ólavsøkurøðu Løgmans á tingi, tók Løgmaður nú eisini undir við at nýta inntøkurnar at rinda uttanlandsskuld landsins.

Orsøkirnar til uppskot Tjóðveldisfloksins eru fleiri.

1) Stórur partur av uttanlandsskuld landskassans á 3,35 mia. kr. (+0,5 mia. kr. rentu- og avdráttarfrítt), skyldast fíggjarligu bjargingarnar av bankunum fyrst í 90'unum. Tí er rætt, at nýta inntøkur frá einskiljing av bankanum – á um 2 mia. kr. (eginpeningur bankans er 1,5 mia. kr., avsetingar 0,6 mia. kr.) – til at rinda aftur hesa uttanlandsskuld.

2) Uttanlandsskuldin hjá landskassanum verður í dag rindað aftur við 5% rentu. Hetta er ein renta, ið liggur væl yvir altjóða rentustøðinum. Tí vil ein afturrindan av uttanlandsskuld í dag verða ein góð íløga.

Arbeitt verður somuleiðis við møguleikanum at umfíggja ein part av uttanlandsskuld landskassans til eina lægri rentu – fyri soleiðis at spara útreiðslur.

3) Afturrindan av skuld merkir færri útreiðslur til rentur og minni avdráttir. Verður øll skuldin rindað yvir eitt áramál – partvís við inntøkum frá einskiljingini, partvís við uppsparing úr Landsbankanum – er talan um 323 mió. kr. árliga í spardum rentum og avdráttum.

Hetta gevur fíggjarligt rúm, ið skal nýtast til at gera føroyska búskapin minni heftan av studningi úr útlondum, og harvið til at minka ríkisstuðulin – blokkin – úr 615,5 mió. kr. í 292,5 mió. kr.

4) Við at nýta inntøkurnar frá einskiljingini til at rinda uttanlandsskuldina, og nýta tær spardu útreiðslurnar til rentur og avdráttir til at minka blokkin verður tryggjað, at inntøkurnar frá einskiljingini av bankanum verða nýttar sum íløga í framtíðina fyri allar føroyingar – heldur enn til vinnulívsstudning, størri almenna fyrisiting ella annað.

### Eitt virðiligt punktum

Greitt er, at ongin peningur kann veita fult endurgjald fyri tann stóra kostnað, ið allir føroyingar máttu rinda fyri búskaparkreppuna fyrst í 90'unum. Men verða inntøkurnar frá eini einskiljing av Føroya Banka nýttar eftir nevnda leisti vil einskiljingin:

– Tryggja at føroyingar fáa sum mest aftur fyri virði landsins í Føroya Banka, og at hesar inntøkur verða nýttar sum íløga í framtíðina fyri allar føroyingar.
- Tryggja ein nærum skuldarfrían landskassa.
- Skerja blokkin í helvt - og harvið gera føroyska búskapin nærum óheftan av studningi úr útlondum.

Hetta má sigast at verða eitt virðiligt punktum fyri tí í mangar mátar óvirðiligu bankakreppuni.

**Upplýsingar:**

| | |
|---|---|
| Uttanlandsskuld landskassans, ið skal rindast: . . . . . . . . . . . . . . . | 3,35 mia. kr. |
| Uppsparing í Landsbanka Føroya um: . . . . . . . . | 2,3 mia. kr. |
| Inntøkur við einskiljing av Føroya Banka um: . . . . . . . . . . | 2 mia. kr. |
| Ríkisstuðul – blokkur – árliga: . . . | 615,5 mió. kr. |
| Rentur og avdráttir av uttanlandsskuld árliga: . . . . . . . | 323 mió. kr. |

## Yrking

Modernisma er ein brotin rútur –
og onkur vinnur 5.000 krónur.
Becham moggar Poch Spice –
og onkur vinnur 5.000 krónur.
Fostrið andar lunguni full av vatni –
og onkur vinnur 5.000 krónur.
Fyrr var yrking orð, sum rímaðu -
tann tíðin er farin.
Ein grindalokkur í leysari luft –
og onkur vinnur 5.000 krónur.
List eru fólk, sum halda seg vera –
men ikki eru!!!
Sámal Mathias er farin –
og listin er »kejserens nye klæder«

**Anna Joensen**